# Reglugerð fyri stuttleika- og aðrar bátar í Eysturkommunu

Hendan reglugerðin er galdandi fyri allar bátaeigarar sum koma til Eysturkommunu í eitt styttri tíðarbil, har eigarin ikki býr ella er skrásettur í Eysturkommunu.

Tað er Eysturkommuna sum umsitur bátaplássini.

§ 1. Bátaeigarar hava skyldu til at fara væl um bátaplássi, økið á landi og flótibrýrnar.

Stk. 1 Tað er strangliga bannað at kasta garnar, høvd ella annað á sjógv innan fyri brimgarðarnar.

Stk. 2 Tá siglt verður inni í bátahylinum, skal ferðin verða so lítil sum gjørligt, soleiðis at aðrir bátar, ið sigla ella liggja bundnir, ikki fáa skaða.

Stk. 3 Bátaeigarar hava skyldu at akta boðini frá havnaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur.

Stk 4 Fyri at forða fyri at olja fer á sjógv, er tað skylda hjá øllum bátaeigarum at hava eitt nøktandi "kjølsvín" liggjandi í kjølinum.

§ 2. Bátaeigarin hevur ábyrgdina av bátaplássinum og skal endurgjalda skaðar, ið koma á útbúnaðin, sum t.d. bummar, festir og á aðrar bátar uttan so, at hesir koma av illveðri ella øðrum, sum bátaeigarin ikki hevur ábyrgdina av.

Stk. 1 Eysturkommuna skal bøta um teir skaðar, sum koma á útbúnaðin, ið stava frá illveðri, vanligum sliti ella elli.

§ 3. Kostnaðurin fyri bátaplássið galdandi frá 1. mai til 30. september er 200,- kr. pr. dag, fyrstu 10 dagarnar, eftir hetta fer gjaldi uppá 500,- kr. pr. dag. Frá 1. oktober til 30. apríl er kostnaðurin 100,- kr. pr. dag.

Stk. 1 Hetta verður skipa soleiðis, at havnaumsjónarmaðurin krevur pengarnar inn ella sendir rokning

§ 4. Bátaeigarin skal boða havnaumsjónamanninum frá við atkomu og fráferð.

§ 5. Reglugerðin kemur í gildið tann 1. mai 2023

**Eysturkommuna**